# kna í pappírsveldi og umsiting




*– Íverksetari, sum hevur kollsiglt við sínum virki, verður stemplaður fyri lívið sum ódugnaligur – ella fyri at vera spekulantur. Vit eiga heldur at siga sum Clinton: "Tað, sum hevur týdning, um tú snávar, er, at tú klárar at reisa teg aftur.. " segði Kitty May Ellefsen, formaður í strategibólkinum fyri íverksetan*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

sum ódugnaligur – ella fyri at vera spekulantur.

– Vit kenna jú øll orðini: "Var tað ikki hann, sum fór av knóranum... "

Kitty May reisti spurningin, um vit ikki heldur áttu at skift hugburð og sagt sum Clinton: "Tað er líkamikið, um tú snávar. Tað, sum hevur týdning er, at tú klárar at reisa teg aftur, eftir at tú hevur snávað..."

### Møttir við skepsis

Hon helt, at almenna fyrisitingin er stirvin móti íverksetarum, sum ikki fáa ta hjálp, teimum tørvar.

– Sambært íverksetarum sjálvum, verða teir ofta møttir við skepsis frá almennari síðu.

Kitty May legði aftrat, at umsitingarligu reglurnar eru fløktar, eitt nú vinnulóggáva, ársroknskaparlóg, partaog smápartafelagslóg, lóg um vinnurekandi virki og grannskoðaralógirnar – fyri at nevna nakrar av trupulleikunum.

– Lítil og eingin ráðgeving er at heinta, og skal íverksetarin út í býin at leita sær hjálp hjá advokatum ella grannskoðarum, fæst hjálpin ikki á sama staði – og eisini kostar hon nógvan pening.

Hon helt, at vandin fyri, at íverksetarin druknar í pappírsveldi og umsiting er stórur.

– Ljósið, sum brendi, slóknar, og hugskotini fara út í bláa luft, sum hon tók til.

### Um skúlans gátt

Kitty May vísti á, at OECD allýsir íverksetan, sum dynamisku tilgongdina, ið er at finna búskaparligar møguleikar, og á hesum grundarlagi at menna, framleiða og selja vørur og tænastur.

– Tann største uppgávan hjá okkum er at fáa allar forðingar av vegnum, legði hon aftrat.

Formaðurin í visjónsbólkinum fyri íverksetan helt, at íverksetan skal røkka inn um skúlans gátt.

– Vit halda, at ein og hvør 9. floks næmingur eigur at duga at gera ein íløguætlan.

Hon legði dent á, at vit eiga at seta individið, sum hon tók til, í sentrum.

– Vit skulu gleðast, tá ið tað eydnast hjá onkrum – og at hesi vinna pening. Gamalt orðatak sigur, at tá ið tað regnar á prest, dryppar tað á dekn. Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg, tí samstundis sum íverksetarin tekur váða á seg, skulu útlitini til at vinna pening vera góð.

### Ráðgeving og netverk

Eitt av málunum, sum bólkurin skjýtir upp, er, at íverksetararáðgeving verður savnað á einum staði, soleiðis at íverksetarin kann venda sær til ein stovn og fáa ta leiðbeining, hann hevur brúk fyri.

Eitt annað, sum eisini hevur víst seg at hava stóran týdning úti í heimi fyri trivnaðin hjá íverksetarum, er, at netverk verða skapt.

– Tað vísir seg at rigga væl, at ein ráðharri ella – í okkara føri – landsstýrismaður er umboðsmaður fyri netverkini, soleiðis at hesi verða viðurkend og knýtt saman við altjóða netverk, segði Kitty May Ellefsen, formaður í visjónsbólkinum fyri íverksetan.

## Meira um íverksetan

Á næstu síðunum fara vit at fylgja einum parti av tí kjaki, sum var í kjalarvørrinum á framløguni um íverksetan á Hotel Føroyum.

Tað var strategibólkurin fyri íverksetan, sum hevði hesa framløgu. Síðan var kjak um evnið, har eitt nú politikarar, fakfelagsumboð, áhugafeløg og embætisfólk høvdu høvi at vera við og gera viðmerkingar.